Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bárður á Lakjuni, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Forlongdar friðingar á landleiðini

Spurningar:

1. Verður friðingin í Kassa I norður úr Mykinesi longd í 2025 á sama hátt, sum hon bleiv í ár?
2. Verður friðingin í vestara parti av Geiranum norður úr Fugloynni longd í 2025 á sama hátt, sum hon bleiv í ár?
3. Áttu søguliga frægar fiskileiðir, sum hava verið stongdar/friðaðar í mong, mong ár, ikki at verið opnaðar aftur – í hvussu er partvís í eini royndartíð?
4. Hvør er høvuðsætlanin við at friða og steingja? Er tað ikki eitt sindur løgið fullkomiliga at friða og steingja frægar fiskileiðir í áratíggju og ikki at lata upp aftur?

Viðmerkingar:

Í svari upp á §52a fyrispurning í september í ár segði landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum, at í dag eru umleið 56% av leiðunum innan fyri 300 m dýpi stongdar fyri veiðu við troli alt árið, undantikið trolbátar, sum hava loyvi at trola eftir flatfiski innan fyri 12 fjórðingar um summarið. Um gýtingarfriðingarnar verða lagdar afturat, so eru umleið 69% av økinum innan fyri 300 metrar dýpdarkurvina heilt ella partvíst friðað fyri trolveiðu. Flestu friðingar hava verið óbroyttar síðani í 1990unum, og summar friðingar eru væl eldri enn tað.

Staðfestast kann, at friðingarnar fyri trolfiskiskap eru sera umfatandi, og tað sýnist at vera torført at reka løngevandi vinnu. Sum steinur oman á byrðu vórðu friðingar í Kassa I norður úr Mykinesi og í vestara parti av Geiranum longdar í mun til tað, sum tær plaga at vera. Hesar friðingar komu sera illa við hjá einum parti av fiskiflotanum, sum longu er sera sperdur. Spurningurin er so, um sama skil verður í 2025, sum tað varð í ár. Hetta eigur vinnan í øllum førum at fáa at vita.

Tað er eisini upp á sítt pláss at spyrja nærri um friðingar og steingingar í heila tikið. Stór øki, sum søguliga sæð hava verið frægar fiskileiðir fyri m.a. trolveiðu, hava verið stongd í langa tíð, ja, í fleiri áratíggju í nógvum førum. Átti partur av hesum økjum ikki at verið opnaður aftur í minsta lagi í eini royndartíð? Ella verður friðað og stongt við tí fyri eyga, at hesi øki ongantíð skulu latast upp aftur?

Á Løgtingi, 7. novembur 2024

Bárður á Lakjuni